# HEILSANIR



**Góðu Dánjal og Danvør á Urmagerstien 18**
Hjartaliga tillukku á 12 og 6 ára døgunum tann 17. og 19. febr. Eisini ein heilsan til Viggo og Joen Hendrik.
**Heilsan, omma og abbi**



**Góðu tit báðir**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 7. og 15. februar.
**Heilsan, mostir og Jonhard**



**Góðu omma og abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardøgunum 16. og 24. febr.
**Bestu ynski, Rói**



**Góði John Dávur**
Hjartaliga tillukku við teimum 21 árunum. Her eru tit báðir cool.
**Heilsan, Bergur**



**Góða, elskaða, søta Súsanna**
Langomma vil ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum 1 ára degi 15. febr. Harrin vælsigni tína framtíð.
**Heilsan, langomman**
P.S. Langommu leingist illa eftir tær.



**Góða, elskaða omma**
Hjartaliga tillukku við tí runda føðingardegnum 16. febr. og alt tað besta í framtíðini. Gleða okkum at koma heim at feira dagin saman við tær.
**Kærar heilsanir frá okkum í Danmark, Anna Sofía**



**Góða, fitta Rakul**
Tillukku við 2 ára degnum ynskja
**Hørður, Lý, Tóki, Urd**



**Góða, elskaða Fríða**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Alt tað besta ynskja
**omma, abbi og mostir**



**Góði John Dávur**
Hjartaliga tillukku við degnum 15. febr. Altíð hava vit verið so væl.
**Heilsan, lítli beiggin**





**Góða, elskaða dóttir**
Hjartaliga tillukku við tínum 1 ára degi 15. febr. Má Harrin vælsigna framtíð tína. Okur elska teg sooo nógv.
**Kærastu heilsanir frá mammu og pabba**



**Góðu tit báðir**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum ynskja
**mamma, omma og abbi**



Hjartaliga tillukku.
Nær skulu vit koma ???
**Heilsan vit á PHT**.





**Góða, elskaða Súsanna**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta ári. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Kærastu heilsanir frá ommu og abba í Sumba**



**Góði, allarbesti Eivind**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 17. febr. Eisini tillukku við arb. Vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini. Hetta var ein minniligur túrur.
**Foreldur og systkin**



**Góðu Bárður og Borgar**
Hjartaliga tillukku við 8 og 11 ára døgunum 20. jan. og 16. febr. Alt tað besta ynskja vit tykkum.
**Heilsan frá mammu, abba og Elin Mariu**

# TILTØK

## FØÐINGAR

3. januar fingu Katrin Gregersen og Jens Eliasen, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

24. januar fingu Elin og Jens Wang, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4250 gr.

7. februar fingu Mai-Britt og Per Holm Andersen, Oyri, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2955 gr.

8. februar fingu Janneth Heinesen, Skála og Kári Petersen, Strendur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3815 gr.

9. februar fingu Tania Ørvarodd og Gunleif J. Bjartalíð, Sandur, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2655 gr.

10. februar fingu Anetta og Sri S. Jacobsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2950 gr.

10. februar fingu Rosa og Eynar-Martin Kjærbo, Skopun, ein son, ið eitur Andrias. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2820 gr.

11. februar fingu Laurina Niclasen og Bárður Olsen, Argir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

11. februar fingu Erika L. og Leif Petersen, Oyndarfjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

13. februar fingu Laura Vinther og Jóanes Árting, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

13. februar fingu Poulina Djurhuus og Jan Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3100 gr.

13. februar fingu Elisabeth Olsen og Heini Jón Rasmussen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.



7. februar fingu Dorthe Pedersen og Súni Christiansen, Tórshavn, búsitandi í Nørresundby, Danmark, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3720 gr.

## ANDLÁT

**08. februar**
Jógvan Hansen, ættaður úr Norðagøtu, búsitandi í Havn, 84 ár.

**09. februar**
Jacobina Joensen, vanliga nevnd Bina, ættað úr Gjógv, búsitandi í Haraldssundi, 79 ár.
Anna Seyer Hansen, Tórshavn, 85 ár.
Marianna Haraldsen, ættað av Selatræ, búsitandi í Sandavági, 92 ár.
Hjarni Jacobsen, ættaður av Morskranesi, búsitandi í Keypmannahavn, 64 ár.

**10. februar**
Eskild Jespersen, Tvøroyri, 82 ár.

**11. februar**
Hilda Samuelsen, Haldórsvík, 82 ár.

**12. februar**
Kjartan Jacobsen, Kaldbak, 78 ár.
Finnur Olsen, Tórshavn, 66 ár.
Olga Gaardlykke, Lamba, 70 ár.

**Føstugudstænastur leygardagin**
*Vesturkirkjan:* kl. 15, deyvagudstænasta, altarg., Jónsvein Bech

**1. sunnudagur í føstu**
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Bergur D. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11, altarg., Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, lestur
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
*Søldarfjørður:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Sumba:* kl. 12,
*Hov:* kl. 16, M. Telling
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Svínoy:* kl. 12, Elsa Funding
*Sandavágur:* kl. 12, føstugudstænasta, kl. 18 David Johannesen
*Norðskála:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa
*Eiði:* kl. 17, messa, Emil Olsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, John Myllhamar
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Skopun:* kl. 12, altarg. Jákup R. Hansen, felagskórið syngur
*Hellur:* kl. 15, Bergur D. Joensen
*Hvalba:* kl. 12.15, altarg.,
*Øravík:* kl. 17, altarg., Jónsvein Bech
*Søldarfjørður:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs
*Kvívík:* kl. 12, M. Bæk
*Sørvágur:* kl. 12, altarg., I. P. Dam
*Tjørnuvík:* kl. 12, Hans J. Joensen, biskuppur.

Talvan gongur fyri Heimamissiónina í Hvalba, Øravík og Oyndarfirði

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Jørundur Hansen, trúboðari í Grønlandi talar. Øll eru vælkomin. Kl. 21 Útimøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 11 Altargangsgudstænasta v/ Hera Joensen, kl. 14 Familjumøti v/ Effie Campell, Tórshavn. Gentukórið í Meinigheitshúsinum í Havn syngur. Børnini fáa okkurt gott. Kl. 18 Møti v/ Malmberg Olsen, Strendur. Argjakórið syngur. Innsavnan fyri Heimamissiónina.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting – ímeðan verða smábørn ansaði í lítlasali. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Sangfundur við felagssangi og sangkórinum í Hebron. 22.-24. februar verður møtirøð í Argja skúla. Svenning av Lofti talar. Barnamøti somu dagar við luttøku av klaksvíkingum.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Petur Jacob Sigvardsen. Evni: Dandadrongurin.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti við Peter Helms úr Hollandi o.ø., sum hava luttikið á mansstevnuni í vikuskiftinum. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti á Brekku 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Vikuskiftismøti við vitjan úr Suðuroynni fríggjadagin og leygardagin kl. 20, drekkamunnur.
Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti. Ymiskir talarar. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids. Kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 17 Møti og Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Thomas Thiomassen.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Katólska kirkjan**
Øskudagar – messa verður í Mariukirkjuni mikukvøld kl. 19.30.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 8 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti, kl. 17 Familjugudstænasta.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 evangel. møti.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Odnhild og Jarvild.
Týskvøldið kl. 20.30 Opið hús fyri ung.
Telefonandaktin 424 741.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17.30 Barnaringurin, Jórun og Nurlan greiða frá arbeiðinum í Kiev.

**Zion, Kollafjørður**
Møtirøðin við Høgna Johannesen og Janus Gunnarson verður hóskvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Evni: Missión, evangelisering, veking og nútíðar atsókn. Filmur verður vístur og sangluttøka verður úr Havn.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jógvan Lamhauge, Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Losjan, Gøta**
Hjartaliga vælkomin til ein tíma við bíbliuni sunnudagin kl. 19.30 v/ Karen J. Lund og Inger J. Hildershavn.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, har Andreas Andreassen luttekur. Í sambandi við missiónsvikuna verður felags ungdómsmøti mánakvøldið 18. kl. 20. Hans Kristian og onnur av Skála luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafjørður**
Evagel. fundur verður sunnudagin kl. 18, Levi Joensen og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen.
Mánadagin kl. 17 Liljurnar.
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti.
Hósdagin kl. 18 Tim. 5.
Fríggjadagin kl. 17.15 Barnamøti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Alpha og Beta skeið byrjar hóskvøldið kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj o.fl. Barnamøti kl. 17.

**Soli Deo Gloria**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bíbliutími/Bøn.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Missiónsvikan heldur fram. Í kvøld kl. 20 Møti við Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen, Felagskórið syngur.
Sunnudagin kl. 12 altargangsgudstænasta við Jákup R. Hansen, presti. Felagskórið syngur. Kl. 15 Familjumøti við Thomas Thomsen, Krist-Bjørg og Eydna syngja. Kl. 18 møti við Jacob Hendrik Hansen. Manskórið syngur. Innsavnan verður til húsið.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Møti í Fjallbrúður kl. 18, Sámal, Fredrik o.o. luttaka.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

**Føroyahúsið**
Leygarkvøldið 23. febr. kl. 19 skipar Kristnastova fyri Gospel Café í Føroyahúsinum. Á skránni verður tónleikur, sangur, vitnisburður v.m. Ókeypis te, kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tí at vit hava her ikki verðandi stað, men vit søkja tann komandi.*
*Heb. 13,14*

Eitt og hvørt menniskja, sum brúkar sítt skil, má skriva undir sannleikan í fyrru helvt av hesum ørindi: Vit hava her ikki verðandi stað. Hvørja løtu, sum fer, hvørja ferð sekundvísarin flytur seg, andast ein mongd av menniskjum kring heimin. Og ein dag eru boð eftir okkum. Vit eru ikki støðufuglur, men flytifuglur. Vit eru sum tey, ið búgva til leigu, og sum longu eru uppsøgd og bara bíða, ofta í óvissu, eftir degnum, tey mugu flyta.

Vit kunnu kanska harmast um, at soleiðis er lógin fyri okkum øll: Vit verða fødd til at doyggja. Tað kann vera nakað í okkum, sum harmast um hetta og mótmæla tí. Men broyta nakað hesum viðvíkjandi kunnu vit ikki. Tað liggur heilt uttanfyri okkara møguleikar. Tá ið ein gudleysur kongur í Danmark einaferð segði tey kendu orðini: »Lat Várharra hava sítt himmiríki, havi eg bara Gurra«, so kundi hann við hesi støðu kanska frásiga sær himmiríki, men hann fekk ikki um ævir rætt til Gurra. Tað gekk ikki við hesum uppskoti hansara, hvussu inniliga hann so ynskti sær tað. Saman við øllum skapninginum á fold varð hann noyddur at boyggja seg fyri tí lóg, sum er galdandi alt livandi: Vit verða fødd til at doyggja; vit hava her ikki verðandi stað.

Men latið okkum hoyra seinnu helvt av ørindinum: Men vit søkja tann komandi, tí í hesi játtan møta vit tí kristiliga, tí, sum ikki er av hesum heimi.Vit sláa okkum til til tols undir deyðans lóg; men vit søkja, søkja at fáa atgongd til hin himmalska staðin, hvørs byggimeistari og grundleggjari er Gud. Jú, hetta er tað kristliga, og tað, ið er eftir Guds hjartalagi.

Í kristinlívinum, har tað er satt og ekta, er álvara í hesi játtan: Heimurin fer til grundar við øllum, sum í honum er, alt í honum er undirlagt forgongiligleikans lóg. Men hendan ásannan hevur føtt eina inniliga tráan eftir tí æviga, nøkrum, sum um ævir ikki ferst.

Tí játta vit á pílagrímsferð okkara gjøgnum heimin: »Vit hava her ikki verðandi stað, men vit søkja tann komandi«. Amen

**J. S. Myllhamar, trúboðari**